Dimma og føroyska radio í Keypmannahavn

Tað er almanna kunnugt, at tíðindamenninir frá Dimmu hava fragd av at bera avskeplað og beinleiðis ósonn politisk tíðindi frá Föroyum til ta donsku pressuna. Eina grefligast kom hetta til sjónar aftaná seinasta lögtingsval og myndan av núsitandi landsstýri. Tíðindini, sum donsku blöðini fingu um ta politisku stöðuna, vóru ikki bara sambandslitað, men beinleiðis ósonn.

Tað er spell, at tað skal verða loyvt monnum at bera seg so at viðurskiftum Föroya og Danmarkar ímillum til óbötiligan skaða.

Mangur maður hevur hildið, at tað átti at verið tikið alment til orða ímóti hesum spilliklútum. Danir hava ta virðing uppiborna av okkum, at vit ikki villa teir við litaðari partapolitiskari agitatión, men siga teimum sum er.

Í eini oddagrein er Dimma úti við spillitungu síni móti teimum föroyingum, ið hava gjört eitt stórt og gott arbeiði fyri at fáa í lag eitt föroyskt útvarp frá Keypmannahavn.

Málið skal vera »vigtigpeteri« og víðari í tann dur, sigur blaðið.

At yrkisdagaútvarpið er hildið uppat, sigur blaðið, kemst av, at föroyingar ikki skula hava tímt at lurta. Og tað undrar blaðið heldur ikki, at fólk ikki hevur lagt lag í at lurta, tí tað hevur einki verið vert, ið sent hevur verið út.

Sum henda greini er skrivað, soleiðis hevur sambandsurgan óivað ýlt oyrunum full á útvarpsmonnunum í Danmark og fingið teir til at hildið uppat við útvarpinum uttan sunnudagssendingini. Og blaðið spáar, at tað kann væl vera, at sunnudagsútvarpið eisini fer fyri bakka. Hyggja síggj!

Við soleiðis at stava og leggja saman skilst, at tað eru *informatiónirnar* frá Dimmu, sum hava steðgað útvarpinum frá Keypmannahavn. Hetta er ein ill gerð, ein skaðagerð, ein ring gerð fyri samvinnuna millum danir og föroyingar.

Vit vilja lata danir vita, at Dimma ummæli av tí föroyska útvarpinum frá Keypmannanhavn er eitt einasta falsum. Tí sannleikin er, at útvarpið var við at verða heilt »populert«. Øll, ið hövdu stundir, lurtaðu eftir sunnudagsútvarpinum og gleddust við tess dygdargóða innihald. Og tað vórðu fleiri eg fleiri, sum lurtaðu eftir yrkisdagsútvarpinum við.

Málið, ið nýtt hevur verið, hevur verið valamál. Teir ungu studentarnir skulu hava tökk fyri, at teir hava sýnt móðurmálinum tann kærleika og ta virðing, at teir hava verið málvandnir og roynt at sloppið undan teimum verstu spillunum uttan at hava gjört málið stirvið og »kunstugt«.

Onkur kann í Föroyum eins og teir hava gjört í Noregi og Svöriki, og eins og teir nú telvast í Danmark, finnast at ella vera ov sterkt fyri framburðinum av talorðunum. Men hví kunnu vit ikki eins og okkara grannar hava ymiskar hugsanir um hetta og onnur öki innanfyri málbrúk okkara?

Sjálvandi kunnu vit hava ymiskar meiningar, og hvör í sínum lagi út frá sakligum grundum berjast fyri teimum. Hetta er avgjört einki minus, men stórt pluss fyri okkara andsmentum og málbrúk.

Kann verða, at Dimma kann fáa í lag at hvala eisini sunnudagsútvarpið. Men tigandi skal hon ikki finna okkum — tað er best at hon ger sær hetta greitt. Tann tíð er farin at hon kundi læsa alla ta donsku pressuna fyri öllum föroyingum uttan sínum egnu spilliklútum.

Radiolurtari.

Snarljós

Russiska blaðið »Fakta om Sovjetunionen«, ið verður útgivið í russis' sendistovuni í Keypmannahavn, hevur m. a. hesi orð um »dollar« úr grein úr russiska blaðnum: Literaturnaja Gazeta«:

. . . Dollaren er den materielle inkarnation af de amerikanske ågerkarles gemenhed og slyngelagtighed, de transoceanske krigsmageres universalværktöj, de marshalliserede ministre og de reaktionere aviser, luftpiraterna, Koreas bödler, lakaj-diplomaterne i FN, Adenauers lejede landsknægte, Yosidas pestbefængte rotter, Titos spioner og Francos böddelknægte, de höjre-sosialistiske ledere og reformistiske fagforeningspampere, de dekadente forfattere og bedærvede Hollywood-film — kort sagt alt det, der hörer sammen med kapitalismens döende verdien, som er på vej over i historien, alt dette vurderes og köbes i dollars

Soleiðis verða dollars mettir frá russiskum sjónarmiði.

★

— Hví skulu tey skiljast.
— Tí hann er matematikkari og hon heilt óútroknilig. —

— Eg skuldi biðja um nakrar sigarettir til konuna —
— Virginia —
— Nei, Jóhonnu. —


Per stendur á grövini hjá Nilsi og heldur fyri:
— Um tú nú, Nils, kundi komið upp og lisið alt, ið stendur á gravsteininum hjá tær, so hevði tú helst trú, at tú vart komin í grövina hjá onkrum öðrum. —



TRYGGINGARSAMBANDIÐ
FØROYAR

Føroya Kriggstrygging .. telf. 372
Føroya Brunatrygging .. telf. 372
Føroya Sjóvátrygging ... telf. 372
Føroya Vanlukkutrygging telf. 221

Vit tryggja:
Bátar - skip - vøru - hús - innbúgv - ferðagóðs bilar o. a.
Føroyingar eiga at tryggja
í landsins egnu trygging –



Tað eru roykpylsurnar ið duga tær frá HOULBERG

Matligt er, og væl rýkur, tá ið hurðin verður gloppað inn í roykrúmið hjá Houlberg, har hundraðtals nossligar roykpylsur hanga lið um lið til at „búnast" . . . HOULBERGs roykpylsur eru gjørdar av fyrsta flokks tilfari, vælkryddraðar, vælsaltaðar og vælbúnar . . .

• Umboð:
B. Mortensen
Tórshavn . tlf. 8

S. HOULBERG A/S
KØDBYEN KØBENHAVN


P.F. FØROYA BANKI
(Stovnaður 1906)

Høvuðsskrivstova:
TÓRSHAVN
Tlf. 6, 50, 365

Suðuroyar deild:
TRONGISVAGI
Tlf. 32

Renta av innskoti við uppsögn uppá 3 mánaðar 4 % p. a.
Renta av bankabók 3½ % p. a.

Bankin er opin 11—15 — Leygardag 11—14



KOMFURET

der blev konstrueret efter ønske af Statens Husholdningsraad. Udført efter moderne principper til al slags brændsel — et ønske-komfur med bl. a. følgende fordele: Rent og tiltalende ydre, minimalt brændselsforbrug, altid varmt vand, effektiv stegeovn, ingen snavsede gryder, ingen røg og sod i køkkenet.

Se komfuret hos:

A/S BALSLEV & CO
THORSHAVN